ítróttur

Nr. 88 • hósdagur • 12. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nýggjur landsliðsleikari

**Borðtennislandsliðið til Oyggjaleikirnar er nú úttikið. Millum leikararnir er Thomas Rasmussen, sum higartil hevur verið eitt púrasta óskrivað blað í føroyskum borðtennishøpi**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk*



*Stóri trupulleikin í liðkappingini hevur verið, at onnursinglan á harrasíðuni hevur verið ov veik, men soleiðis verður neyvan á Hetlandi*

Uttan at forsmáa nakran av heimligu føroysku borðtennisleikarunum, so ber helst til at staðfesta, at tá tosast skal um heiðursmerkjavónir á Oyggjaleikum, so hevur nógv hvílt á herunum hjá Kjartani Eli Hentze. Kjartan Eli er búsitandi í Danmark, men ættarbondini eru hálvføroysk, og tí hevur borið til hjá honum at umboða Føroyar á leikunum.

Tað hevur millum annað borið heiðursmerki við sær í bæði ein- og tvímansleiki, og útlitini fyri hesum eru neyvan verri hesaferð. Tað er nevnliga so, at umframt Kjartan Eli verður eisini ein annar leikari úr donskum borðtennishøpi á føroyska liðnum hesaferð. Talan er um 22 ára gamla Thomas Rasmussen, ið eins og Kjartan Eli hevur føroyska mammu. Nakrar mánaðir av barnaárunum búi Thomas eisini í Føroyum, men síðani hevur tað verið í Danmark, at hann hevur búleikast. Í borðtennishøpi spælir hann dagliga eina deild omanfyri Kjartan Eli, so venjingar- og dystarstøði skuldi á pappírinum verið í minsta lagi eins gott.

## Stórur styrkur á liðnum

Tað er danski venjarin hjá føroyska liðnum, Preben Larsen, sum hevur fingið samband við Thomas. Undan hesum var tað als eingin í føroyska borðtennisheiminum, sum visti av leikaranum, ið heilt víst fer at styrkja um føroyska liðið.

- Vit royna í løtuni at seta nakað av yngri leikarum við í føroyskum borðtennis, og tí verið eg millum annað ikki við sum leikari, sigur ein av veteranunum í føroyskum borðtennis, Petur Niclasen.

- Hinvegin hava vit nú eisini tveir sterkar mans á harrasíðuni, og tað kann væl viðføra, at vit koma at standa okkum munandi betri í liðkappingini. Her hevur stóri trupulleikin hjá okkum verið, at næsta harra-singlan ikki hevur verið nóg sterk. Tann trupulleikin skuldi í øllum førum verið loystur nú, samstundis sum vit so eisini hava eina sterka double, sigur Petur.

Petur heldur, at styrkurin hjá liðnum kann hava við sær, at Føroyar væl kunnu røkka einum hálvfinaluplássi í liðkappingini, har vit í fjør endaðu á einum sætta plássi.

Afturat sær koma Kjartan Eli og Thomas at hava Ragnar Egilsson, og so verða tær báðar, Maria í Dali og Susia Midjord.

## FAKTA

**Føroyska liðið á Hetlandi**
Kjartan Eli Hentze, 32 ár, spælir í 3 deild í Greve Bordtennisklub - hevur verið við síðani 1997, og hevur vunnið Føroyum fleiri heiðursmerki: Silvur í einmansleiki í 1997. Bronsu í einmansleiki í 2001 og 2003. Bronsu í tvímansleiki í 1999 og 2001. Væntast at spæla 2. singlu á leikunum.

**Ragnar Egilsson, 16 ár, spælir í TÓR -** Borðtennissambandið fylgir tí, ið hevur verið gjørt til seinastu tveir oyggjaleikirnar - og tað er at senda ein av góðu ungu mannligu leikarunum við til Oyl. Ragnar var við fyrstu ferð í 2003. Væntast at spæla 3. singlu á leikunum.

**Thomas Rasmussen, 22 ár, spælir í 2. deild fyri Køge**, har landsliðsvenjarin Preben Larsen hevur fingið samband við hann. Mamman er úr Leirvík. Thomas er ein ungur og sterkur leikari, sum er brýndur í donsku kappingini. Tryggur leikari, ger fá mistøk undir trýsti. Væntast at spæla 1. singlu á leikunum.

**Marin í Dali, spælir í TBF** - hevur hóast bert 16 ára gomul vunnið kvinnudeildina nakrar ferðir. Gjørt stór framstig síðani seinastu oyggjaleikir, har hon eisini var við. Væntast at spæla 1. singlu á leikunum.

**Susie Midjord, 15 ár, spælir í TBF** - vann í ár kvinnudeildina frammanfyri Marin. Væntast at spæla 2. singlu á leikunum.

**Bestu føroysku úrslitini**
**Liðkapping:** Silvur á Álandi í 1991. Birgir Carlsson, Dagbjarti Hammer, Peter Niclasen, Onnu Petersen og Rannvá Magnussen. Bronsa í Føroyum 1989.
**Einstaklingar, menn:** Silvur á Jersey í 1997, Kjartan Eli Hentze
**Tvímansleikur, menn:** Silvur á Álandi 1991, Dagbjartur Hammer og Birgir Carlsson. Bronsa á Isle of Wight í 1993, Eyðun Luid og Birgir Carlsson. Bronsa á Gotlandi í 1999, Hans Hammer og Kjartan Eli Hentze. Bronsa á Isle of Man í 2001, Kjartan Eli Hentze og Petur Niclasen.



*Kjartan Eli Hentze*



*Ragnar Egilsson*



*Thomas Rasmussen*



*Marin í Dali*



*Susie Midjord*